ítróttur

Nr. 41 • mánadagur • 27. februar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Kaggin føroyameistari í billard

**Kaggin gjørdist tann drúgvari í kapprenning við Klaksvíkar Klubba um vikuskiftið**

BILLARD
*Tíðindaskriv*

Kaggin er nýggjur føroyameistari í billard. Eftir ein sera spennandi endaspurt millum Kaggan og Klaksvíkar Billardfelag eydnaðist tað teimum trimum kaggaspælarunum, Bjarna Skaalum, Steinbjørn í Dali og Jan Müller at hála flest stig heim.

Tá avtornaði fekk Kaggin 44 stig, Klaksvíkar Billardfelag 38 stig og Havnar Klubbi 26 stig.

**Fingu neyðugu stigini**

Kaggin, sum legði sera hart út í kappingini við at vinna 18-0 móti føroyameistaraliðnum úr Havnar Klubba, fekk sera harða mótstøðu í seinasta umfarinum móti Klaksvíkar Billardfelag.

Í dystinum, sum varð spældur í Havn í dag, skuldu Kaggamenn hava 4 stig fyri at gerast meistarar. Teir fingu 6 stig og vunnu harvið gullið. Klaksvíkar Billardfelag, sum máttu lúta fyri garvaðu kaggamonnunum, varð mannað við Kristian Suna Høgnesen, Sonhard Johannesen og Njál Reinert Petersen.



*Kaggin vann um vikuskiftið liðkappingina í billard. Teir, ið hava spælt við liðnum í ár, eru Bjarni Skaalum, Steinbjørn í Dali og Jan Müller*

**FM í mars og apríl**

Í kappingini í aðru deild liggur Billardfelag Kaggans eisini á odda. Liðið hevur 56 stig. Havnar Klubbi er nr. 2 við 50 stigum, Vágs Billardfelag er nr. 3 við 46 stigum, nr. 4 er Klaksvíkar Billardfelag við 24 stigum og aftast er Tvøroyrar Billardfelag við 14 stigum.

Føroyameistarakappingin fyri staklingar verður í mars og apríl. Innleiðandi umfarið verður 24. og 25. mars og finalan 8. apríl í Havnar Klubba.

# Jón millum heimsins 20 bestu

**Jón Rosenbladvar um vikuskiftið við í HM í innandurarógving, og hann endaði sum nummar 19 í røðini av teimum mongu rógvarunum, sum vóru við í kappingini í Boston**

RÓGVING
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Eini 200 rógvarar vóru við til HM-kappingina í Boston um vikuskiftið. Fremsti føroyski rógvarin, Jón Rosenblad úr Lamba, hevði sett sær sum mál, at hann skuldi náa fram millum 10 teir bestu rógvararnar í kappingini, men tað skuldi ein heilt serligur innsatsur til, um hetta skuldi eydnast.

Jón skuldi sláa sítt egna met væl og virðiliga fyri at gera ein av teimum 10 í toppinum, og tað gekk ikki.

Heimasíðan hjá Havnar Róðrarfelag skrivar, at Jón Rosenblad gjørdist nummar 19 í kappingini í Boston, og hóast tað var nakað væl burtur frá nummar 10, so var úrslitið gott, tá ið hugsað verður um, at eini 200 rógvarar vóru við í kappingini, sum hann tók lut í.

**Fremsti norðurlendingurin**

Kappingin í Boston var ein stór kapping, tí heili 1500 úr øllum heiminum vóru við teimum ymsu bólkunum. Hetta var áttanda ferðin, at kappingin varð hildin.

Jón Rosenblad, sum hevur fingið góð úrslit í kappingum í Danmark seinastu árini, er tann fyrsti føroyingurin, sum tekur lut í HM-kapping í innandurarógving, skrivar www.drekin.fo

Vinnarin av kappingini í Boston gjørdist Graham Benton, sum er úr Stórabretlandi. Ein amerikumaður var nummar 2 og italiumaður nummar 3.

Jón Rosenblad var fremsti norðurlendingurin í sínum bólki.

## Pólendingur til EB/Streym

Hósdagin kemur ein pólendskur spælari til EB/Streym at royna seg. Rafal Kwiecinsk er álopssinnaður spælari, og hann kann bæði spæla í álopinum og á miðvøllinum. Hann er 30 ára gamal og kemur í fyrstu syftu til EB/Streym fyri at vísa, hvør dugur er í honum. EB/Streymur hevði herfyri nigerianska álopsspælan Joseph Odogu til royndarvenjing, men einki spurdist burturúr tí.

## LÍF fingið hjálparvenjara

Tá ið LÍF leygardagin spældi venjingardyst ímóti AB í Leirvík, stóð ein nýggjur maður við síðulinjuna og stýrdi LÍF-liðnum. Hans Fróði Hansen er spælandi venjari hjá LÍF, og nú hevur LÍF sett Ólavur Waag Høgnesen sum hjálparvenjara hjá liðnum. Ólavur hevur verið virkin sum venjari í nógv ár samanlagt. Hann hevur serliga vant yngri lið í B36 og KÍ.

## Byrial tapi til Warsawa

Johan Byrial Hansen og liðfelagarnir í AC Horsens hava seinastu vikuna verið á venjingarlegu í Cadiz í Spania. Um vikuskiftið spældi AC Horsens ímóti pólska liðnum Legia Warsawa, og Horsens tapti 2-0. Sagt veður, at liðið úr Póllandi var væl sterkari enn AC Horsens, og tí var einki at siga til tapið. Johan Byrial Hansen var við á liðnum hjá AC Horsens í hesum dystinum.

## Claus hugdi at

Føroyski landsliðsspælarin Claus Bech Jørgensen kom ikki á vøllin, tá ið Coventry leygardagin vann 1-0 á Burnley. Adebola skoraði einsamalla málið stutt eftir hálvleikssteðgin. Claus Bech Jørgensen var tikin út til dystin, og hann var eykamaður. Bið vóru ikki eftir honum hesaferð, og tí kundi hann sita og hyggja eftir dystinum á beinkinum allar 90 minuttirnar.

## Frem fekk gott úrslit

Frem spældi um vikuskiftið javnleik ímóti svenska felagnum Helsingborg í einum av seinastu venjingardystunum undan kappingarbyrjan. Jónas Tór Næss spældi allan dystin sum vinstri bakkur, og seinastu minuttirnar var eisini Atli Gregersen á vøllinum. Dysturin endaði 1-1, og tað eru tey í Frem væl nøgd við. Helsingborg er eitt sterkt svenskt lið, sum hevur fleiri góðar spælarar á liðnum.

## Fremad tapti

Tað hevur ikki gingið nakað serligt hjá Fremad Amager seinastu tveir venjingardystir, og hvør veit, um orsøkin ikki er, at Andrew av Fløtum er við landsliðnum í USA á venjingarlegu. Fremad Amager spældi leygardagin venjingardyst ímóti Hvidovre, og dysturin endaði við 2-1 tapi.

## Súni spældi eina løtu

AaB spældi fríggjadagin venjingardyst ímóti Randers FC, og tað eydnaðist at vinna dystin 3-2. Súni Olsen var á beinkinum, men hann kom á vøllin í seinna hálvleik, tá ið støðan var 2-1 til AaB. Løtu seinni javnaði Randers FC til 2-2, eftir at AaB hevði verið á odda 2-0 í hálvleikinum, men AaB fótaði sær aftur og fekk sigurin heim við einum triðja máli. Súni Olsen kom inn á miðvøllin at spæla í 66. minutti, og har slapp hann millum annað at takast við kenda danska miðvallara Stig Tøfting, sum nú spælir fyri Randers.